bátahylinum sunnanfyri, verður neyðugt at gera eina atløgusíðu, eina rampu og at seta upp fendarar.

Landsverk sigur, at mettur meirkostnaður av hesum verður umleið 3 mió krónur.

## Sámulig íløga

Jóhan Hentze, borgarstjóri, heldur, at ein íløga upp á tilsamans 26,4 mió krónur, har lagt er upp fyri einum møguligum meirikostnaði við 10% - ella 2,3 mió krónum, er sámulig.

– Vit hava sent tvær umsóknir til Vinnumálaráðið, har vit hava biðið ráðið taka málið um umbygging og víðkan av havnalagnum upp. Í fjør summar vístu vit á, at projekteringin hjá Landsverki fór at verða liðug í desember síðsta ár. Í svarinum, vit fingu, vísti Vinnumálaráðið á, at teir høvdu móttikið áheitanina, og at ráðið skuldi viðgera málið saman við Landsverki.

Jóhan sigur, at Skúvoyar kommuna aftur hevur sent Vinnumálaráðnum eina áminning nú fyrst í hesum árinum.

– Eg føli faktist, at málið um umbygging og víðkan av verandi bátahyli í Skúvoy fyribils er »parkerað« í Vinnumálaráðnum, men eg veit ikki, hví so er.

Hann leggur dent á, at í hesum máli er ikki neyðugt við nøkrum fyrireikingum, projekteringum, kjarnuboringum ella øðrum.

– Verkætlanin, sum er so avgerandi neyðug fyri okkum skúvoyingar, liggur púra klár at fremja. Tað hava vit fleiri ferðir fingið váttað frá Landsverki, sigur borgarstjórin.

Jóhan sigur, at Skúvoyar kommuna beinleiðis hevur søkt um at fáa eina játtan á løgtingsfíggjarlógini til verkætlanina.

– Eg vil staðiliga heita á myndugleikarnar um, at ætlaða verkætlanin í Skúvoy ikki verður tvinnað saman við »stuðli til útoyggjar«, men verður ein vanlig játtan, sum aðrar játtanir til samferðslukervið í Føroyum.

Hann heitir á myndugleikarnar, løgtingi og landsstýri, um at játta einar 13 mió krónur yvir tvey fíggjarár, soleiðis at skúvoyingar kunnu síggja fram til, at verkætlanin verður veruleiki innan líkinda tíð.




*Landsverk heldur, at atløguviðurskiftini í verandi bátahyli kunnu betrast við 90%, um ein brimgarður verður bygdur sunnanfyri bátahylin, og innsiglingin verður flutt til syðra enda av verandi hyli*

*Mynd: Landsverk*

## Serflutningur

– Tað hevur nógv at siga fyri okkum, at vit í hampiligum líkindum kunnu fáa Teistan inn í havnina, soleiðis at vit kunnu fáa serflutning í oynna, tá ið tørvur er á tí.

Jóhan vísir á, at tá ið Tróndur gavst at sigla, vórðu skúvoyingar – so løgið tað ljóðar, »bumbaðir« nógv ár aftur í tíðina, tí Tróndur kundi hóast alt flyta maskinur og annan tungan útbúnað til og av oynni.

– So gamal og ótíðarhóskandi, sum Tróndur var, vóru vit fyri ógvuliga stórum missi, tá ið Tróndur gavst at sigla. Tyngsta »kolli«, sum flytast kann við Rinuni, er minni enn tvey tons, og tað gevur okkum ongar møguleikar til nakran serflutning.

Hann vísir á, at ein stórur fyrimunur við Teistanum hevði verið, at tangabilar kundu komið í oynna við olju til bæði SEV-verkið og húsarhald, soleiðis at sloppist kundi undan stríðnum við oljutunnunum.

## Sildberin álitið

Tað er Sildberin, sum røkir siglingina millum Skúvoy og Sand. Hetta er eitt lítið skip, sum rullar illa og siglir seint, og tað eru mong, sum ikki hætta sær um fjørðin uttan í allar besta veðri. Er nakað í sjónum, kanst tú ikki standa úti á dekkinum og fáa tær fríska luft, men noyðist at halda teg innandura.

– Men soleiðis, sum atløguviðurskiftini í Skúvoy eru háttað, finst ikki betri skip til bátahylin. Sildberin er sterkur og liggur væl í sjónum. Men tað eru nógv, sum »nokta« at fara í bátin, um ikki besta veður er.

Jóhan ásannar, at neyðugt er hjá skúvoyingum at hava eitt skip, ið klárar havnaviðurskiftini, sum hann tekur til.

– Annars verður ikki komandi av oynni, ei heldur heimaftur, leggur hann aftrat.

Borgarstjórin vísir á, at mangur hevði ógvast, um tey sóu, hvussu nógv mangan hevur verið lagt fyri við hesum skipi.

## Niður á bakka

Í Skúvoyar kommunu, sum eisini fevnir um Stóru Dímun, eru skrásett umleið 60 fólk, harav stívliga 50 eru skrásett at búgva í Skúvoy og eini 7-8 í Stóru Dímun.

– Fastbúgvandi í oynni eru vit kortini ikki so mong, sigur Jóhan.

Í Skúvoy eru trý skúlabørn. Onkur starvast hjá SEV, onkur hevur Sildberan, onkur undirvísir børnunum – og onkur hevur nakað av jørð og seyði at fáast við.

Sjálvur arbeiðir Jóhan hjá SEV í Skúvoy í ein mánaða í senn, og so plagar hann at arbeiða hjá Tórshavnar Skipasmiðju, tá ið ein annar maður røkir SEV-verkið í bygdini.

Jóhan er 38 ára gamalur, men tá ið hann gekk í barnaskúla í Skúvoy, vóru tey einir 14-16 næmingar.

– Eg má siga, at her hevur gingið skjótt og støðugt niður á bakka.

Um útlitini, sigur borgarstjórin, at tey standa og fella við ætlaðu umbyggingini og víðkanini av bátahylinum.

– Samferðsluviðurskiftini er fyrsta treytin fyri trivnaði á útoyggj. Nú væntandi er, at koyrandi verður um undirsjóvartunnil millum Sandoy og Streymoy um eini 6-8 ár, seta vit okkara vónir til eitt nøktandi havnalag og eina nøktandi samferðslu, sum er altavgerandi fyri framtíðina hjá Skúvoynni.

## Trivnaður

Borgarstjórin sigur, at kommunan eisini arbeiðir við einum sparkikvølli og soleiðis roynir at skapa karmar og trivnað hjá yngra, men fámenta ættarliðnum í oynni.

– Av tí, at samferðsluviðurskiftini eru, soleiðis sum tey eru, verður ein sparkivøllur eitt ódnartak hjá okkum, tí neyðugt er at fáa maskinur út í oynna.

Jóhan Hentze sigur, at kommunan eftir førimuni roynir at skapa karmarnar, og síðan verður tað upp til borgarnar at taka initiativini.

– Okkara skattainntøka er komin niður ímóti teimum 800.000 krónunum um árið, men í staðin fyri at brúka allan peningin til kloakkir og vegir, hava vit nú sett okkum fyri at byggja ein sparkivøll í Skúvoy.

## Bíða.. og vóna

Hóast hon er lítil, skyldar Skúvoyar kommuna ongan pening, men eigur í staðin nakað á bók.

– Vit hava eingi lán útistandandi, sum borgarstjórin tekur til, men hava bert tær solidarisku bindingarnar, sum eru millum kommunurnar annars.

Jóhan Hentze sigur, at tað er tó rættiliga avmarkað, hvussu nógv ein so lítil og fáment kommuna, sum Skúvoyar kommuna, megnar.

– Nú bíða vit bara eftir Vinnumálaráðnum og vóna, at politiskur vilji verður til at fremja ta ætlan, sum liggur klár at fremja í verki, sigur borgarstjórin at enda.



*Sildberin er álitið hjá skúvoyingum, men hann nøktar ikki tann tørv, sum oyggin hevur. So leingi, havnaviðurskiftini eru ónýtilig, er heldur ikki møguligt við nøkrum hóskandi flutningi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*